BRÚKARIN

# Kanning av skúlataskum

BRÚKARATILFAR
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

**Skúlabyrjan:** Nú summarfrítíðin lækkar móti endanum, verður nýggj skúlaútgerð bunkrað. Tey stóru skulu kanska bara fylla pennahúsan, meðan tey smæstu skulu hava nýggja skúlatasku. Danski stovnurin Forbrugerlab hevur kannað góðsku, fyrimunir og vansar við skúlataskum til tey smæstu. Ikki er vist, at júst hesar taskurnar eru á føroyska marknaðinum, men kortini kann kanningin geva íblástur til, hvat havast skal í huganum, tá tit keypa nýggja tasku.

Sambært Forbrugerlab er onki samband millum prís og góðsku. Samanumtikið eru allar taskurnar dygdargóðar, men Jeva-taskan fekk flest stig.

Vit hava ikki tikið allar faktorarnar við her, men til ber at síggja kanningina á www. forbrugerlab.dk.

## Soleiðis velur tú bestu skúlataskuna til barnið

- Latið barnið royna taskuna, áðrenn tit keypa hana
- Lat barnið royna taskuna í úti- og inniklæðum
- Taskan skal sita á rygginum – ikki á rumpuni
- Taskan skal ikki vera breiðari enn herðarnar á barninum
- Bakið á taskuni skal liggja at rygginum á barninum – allan vegin upp
- Taskan skal vera passaliga djúp, so innihaldið ikki dettur úr
- Fráskild rúm skulu vera til matkassa, drekkidunk, pennahús og bøkur
- Snarlás og spenni skulu vera løtt at brúka – eisini hjá barninum
- Endurskin økja um ferðslutrygdina í myrku tíðini



| Taska | Fyrimunir | Vansar | Døming (1-5) | Vekt (kg) | Mát | Tilhoyr | Onnur snið | Vegl. prísur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
|  DIDDL DIDDLINA & GALUPY | • Lætt at innstilla stropparnar • Stendur væl • Gott rúm til pennahúsan | • Ov stór til tey flestu • Bókarúmið ov stórt • Ongin reim um bringuna • Akslastroppar arga | ★★★★ | 1,1 | 42 x 26 x 20 | Onki | Fæst í nógvum øðrum litum – bert til gentur | 699,- |
|  DISNEY WITCH | • Perfekt innrættað • Hóskar til tey flestu • Liggur væl at rygginum • Góð uppbýting av bókarúmi | • Ber ikki til at stilla stropparnar, tá taskan er á • Stendur ikki sjálv • Spennið til bringureimina bindur • Aklastroppar arga | ★★★½ | 1,5 | 40 x 26 x 19 | Matkassi, drekkidunkur og fimleikataska | Fæst ikki í øðrum sniðum ella litum | 500,- |
|  JEVA BEGINNERS | • Góðir akslastroppar • Løtt at handfara • Væl innrættað • Hóskar til tey flestu | • Rúmið til pennahúsan er ov lítið • Liggur ikki væl inn at lendunum | ★★★★½ | 1,1 | 37 x 25 x 18 | Matkassi, drekkidunkur og fimleikataska | Fæst í øðrum litum – eisini til dreingir | 499,- |
|  LEGO BIONICLE | • Væl innrættað • Hóskar til tey flestu • Góð fimleikataska • Liggur væl at rygginum | • Akslastroppar arga • Torført at innstilla stropparnar, tá taskan er á • Rúmið til pennahúsan er ov lítið • Trek snarlás | ★★★★ | 1,1 | 36 x 29 x 20 | Matkassi, drekkidunkur og fimleikataska | Fæst í fleiri litum – eisini til gentur | 499,- |
|  PANINO | • Góðir akslastroppar • Væl innrættað • Lætt at stilla akslastroppar • Stendur væl | • Ov høg til tey flestu • Ógjørligt at innstillað bringureimina, tá taskan er á • Rúmið til pennahúsan er ov lítið • Situr ikki at lendunum hjá øllum | ★★★★ | 0,9 | 39 x 26 x 18 | Fimleikataska | Fæst í øðrum litum – eisini til dreingir | 349,- |
|  MARVEL SPIDERMAN | • Liggur væl at rygginum • Góð snarlás • Stendur væl • Gott rúm til matpakkan | • Ov høg til tey smæstu • Onki rúm til pennahúsið • Spenni til bringureim er ov stramt • Akslastroppar arga | ★★★★ | 1,1 | 39 x 27 x 18 | Matkassi, drekkidunkur og fimleikataska | Fæst ikki í øðrum sniðum ella litum | 399,- |
|  TICKET TO HEAVEN LÍTIL | • Sera lætt at stilla stropparnar • Góð snarlás • Stendur væl • Góður haldari til drekkidunk | • Liggur ikki at lendunum • Akslastroppar arga • Spennini binda • Rúmið til pennahúsan er ov lítið | ★★★★ | 0,9 | 38 x 26 x 15 | Matkassi, drekkidunkur og fimleikataska | Fæst í fleiri litum – eisini til gentur | 499,- |
|  ALPINE SMALL | • Sera væl innrættað • Góðir akslastroppar • Góð hædd • Góð reim um bringuna | • Ov breið • Ber ikki til at innstilla akslastroppar, meðan taskan er á • Spennini binda • Stendur ikki sjálv | ★★★★ | 1,2 | 38 x 31 x 19 | Fimleikataska og regnslag | Fæst í fleiri litum – eisini til gentur | 299,- |